

## *Eksklusiv útgávu-konsert við ORKA í Saltsøluni*

Í samband við nýggju útgávuna hjá ORKA, ÓRÓ, er bólkurin nú farin á mánaðarlanga konsertferð kring alt Evropa. Stóra brakið verður tó, tá bólkurin vendir leiðina heim aftur til Føroya síðst í mai, har skipað verður fyri stórari útgávukonsert í Saltsøluni í Tórshavn.

Vælumtókta nýggja útgávan hjá ORKA, var upptikin í februar mána 2010 í betongkalda bygningsverkinum "Saltsølan" í Havn. ORKA leigaði bygningin í ein mánað, har teir bæði gjørdu nýggj ljóðføri umframt at skriva og upptaka alt tað nýggja tilfarið.

So sjávsagt skal útgávukonsertin verða í Saltsøluni. Havnameistarin hevur lovað, at hettar er bæði fyrstu og síðstu ferð, at høvi verður at sleppa á konsert í Saltsøluni. Her sleppur áhoyrarin veruliga at uppliva ORKA í síni røttu náttúru, har ljóð, ljós og sjálvt umhvørvi ganga upp í eina hægri eind.

Teir ið koma at mynda bólkin verða Jens L. Thomsen, Ólavur Jákupsson, Oktopus, Høgni Lisberg og Uni Árting. Oktopus, ið er kendur frá elektro duo'ini Dälek, borðreiðir við MRC Riddims áðrenn stóra konsertin hjá ORKA byrjar.

Øll eru vælkomin at trýna inn í myrka, Lynch kenda universið, saman við ORKA 30.mai klokkan 20.00. Sigast, skal tó at tað er avmarkað atgongd til konsertina.

# Básar



Heilaparkering í Hoydølum

## Í MORGIN

7/9°C



1-6 m/s | 1-6 m/s

Fleyr til gul av eystri og landsynningi, turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

## MIKUDAGIN

5/8 °C



3-8 m/s | 1-6 m/s

Fleyr til gul av eystri. seinnapartin upp í andøvsgul. Turt og sólglottar og hitin millum 9 og 12 stig.

## HÓSDAGIN

5/8 °C



7-12 m/s | 5-10 m/s

Gul til stívt andøvsgul av eystri, um kvøldið upp í ein strúk. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 13 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ



**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1035 hPa. vestan fyri Lofoten viknar nakað.



**Komandi nátt:**
Hátrýstið yvir Norðsjónum viknar. Lágtrýstið vestan fyri Portugal stendur mestsum í stað.

## HITALAG

fyri mai




## AVFALL

fyri mai




Miðal: 70 mm



**Petur Skeel Jacobsen**
greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -9 | **Tromsø** | -1 | **Moskva** | -13 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 8 | **Bergen** | -2 | **Berlin** | -6 | **Beijing** | 11 |
| **Tórshavn** | 7 | **Oslo** | -9 | **Paris** | 3 | **New Dehli** | 20 |
| **Lerwick** | 4 | **Stokkhólm** | -6 | **Madrid** | 15 | **Bangkok** | 32 |
| **Aberdeen** | 7 | **Keypmannah.** | -4 | **Róm** | 11 | **Sydney** | -- |
| **London** | 8 | **Helsinki** | -19 | **Malorca** | 15 | **New York** | 2 |

## VESTFALLSKYRRINDI

29. apríl — Mánin longst frá jørðini
3. mai — Tendring

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. mai | 06:44 | 19:04 | 05:44 | 18:04 | 05:59 | 18:19 | 08:44 | 21:04 | 09:44 | 22:04 | 04:59 | 17:19 | 03:59 | 16:19 | 06:59 | 19:19 | 07:59 | 20:19 | 06:29 | 18:49 | 07:44 | 20:04 |
| 3. mai | 07:25 | 19:47 | 06:25 | 18:47 | 06:40 | 19:02 | 09:25 | 21:47 | 10:25 | 22:47 | 05:40 | 18:02 | 04:40 | 17:02 | 07:40 | 20:02 | 08:40 | 21:02 | 07:10 | 19:32 | 08:25 | 20:47 |
| 4. mai | 08:08 | 20:30 | 07:08 | 19:30 | 07:23 | 19:45 | 10:08 | 22:30 | 11:08 | 23:30 | 06:23 | 18:45 | 05:23 | 17:45 | 08:23 | 20:45 | 09:23 | 21:45 | 07:53 | 20:15 | 09:08 | 21:30 |
| 5. mai | 08:52 | 21:15 | 07:52 | 20:15 | 08:07 | 20:30 | 10:52 | 23:15 | 11:52 | - | 07:07 | 19:30 | 06:07 | 18:30 | 09:07 | 21:30 | 10:07 | 22:30 | 08:37 | 21:00 | 09:52 | 22:15 |
| 6. mai | 09:38 | 22:02 | 08:38 | 21:02 | 08:53 | 21:17 | 11:38 | - | 00:15 | 12:38 | 07:53 | 20:17 | 06:53 | 19:17 | 09:53 | 22:17 | 10:53 | 23:17 | 09:23 | 21:47 | 10:38 | 23:02 |